# Umhvørvis- og vinnumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 21.09.2022 |
| Mál nr.: | 22/15350 |
| Málsviðgjørt: | JPP |
| Ummælistíð: | 21-25. sept. |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021**
(Broytingar í tøkugjaldinum)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2014 um loyvisgjald á alivinnu, sum broytt við løgtingslóg nr. 162 frá 24. desember 2015, løgtingslóg nr. 180 frá 21. desember 2018 og løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 2, stk. 4, nr. 1, verður "kr. 36 fyri kilo" broytt til: "kr. 70 fyri kilo", og "5%" verður broytt til "10%".

**2.** Í § 2, stk. 4, nr. 2, verður "kr. 32 fyri kilo" broytt til: "kr. 55 fyri kilo", og "kr. 36 fyri kilo" broytt til "kr. 70 kilo", og "2,5%" broytt til "7,5%".

**3.** § 2, stk. 4, nr. 3, verður orðað soleiðis: "Er miðal altjóða marknaðarprísurin kr. 45 fyri kilo ella hægri, men lægri enn kr. 55 fyri kilo, er gjaldið 5,0%".

**4.** § 2, stk. 4, nr. 4, verður orðað soleiðis: "Er miðal altjóða marknaðarprísurin hægri enn kr. 40 fyri kilo, men lægri enn kr. 45 fyri kilo, er gjaldið 2,5%."

**5.** § 2, stk. 4, nr. 5, verður orðað soleiðis: "Er miðal altjóða marknaðarprísurin lægri enn kr. 40 fyri kilo, er gjaldið 0,5%."

**6.** Í § 2, stk. 7, verður "1. oktober" broytt til "1. november".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Framleiðslukostnaðurin í alivinnuni er munandi hækkaður seinnu árini. Tí uppstanda støður, har alifyritøkur fara at rinda meira enn 0,5% í loyvisgjaldi, hóast laksaprísurin á heimsmarknaðinum er serliga lágur. Samstundis vóru í vár dømi um, at alifyritøkur rinda í minna lagi, tá ið laksaprísurin á heimsmarknaðinum er serliga høgur. Tískil er landsstýrið samt um at tillaga lógina um loyvisgjald á alivinnuna.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lógin á økinum er løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2014 um loyvisgjald á alivinnu, sum broytt við løgtingslóg nr. 162 frá 24. desember 2015, løgtingslóg nr. 180 frá 21. desember 2018 og løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember.

*Stutt um lógina*

Í galdandi lóg er grundarlagið fyri tøkugjaldinum mánaðarliga tøkan av alifiski í kruvdari vekt, faldað við miðal altjóða marknaðarprísinum í sama mánaði. Gjaldið verður ásett sum ávíst prosent av gjaldsgrundarlagnum.

Tað er umráðandi at hava fyri eygað, at loyvisgjaldið á alivinnuna er ikki at meta sum ein skattur, men heldur sum eitt nýtslugjald, sum landsmyndugleikarnir áleggja fyri rættin at gagnnýta føroysku aliøkini.

Meginreglan í tøkugjaldsskipanini er, at jú hægri alifiskaprísurin er, tess hægri er gjaldið:

Er prísurin 36. kr. kilo ella hægri, er gjaldið 5%.
Er prísurin millum 32 kr. og 36. kr. kilo, er gjaldið 2,5%.
Er prísurin lægri enn 32 kr. kilo, er gjaldið 0,5%.

Við átekning í løgtingsfíggjarlógini fyri fíggjarárið 2022 er ásett, at mánaðarligi miðalspotprísurin í evrum fyri kruvdan laks sambært “Fish Pool Index” verður brúktur sum altjóða marknaðarprísur til útrokning av avgjaldsgrundarlagnum undir loyvisgjaldinum.

Umroknað verður til danskar krónur við at nýta sentralkursin hjá Danmarks Nationalbank.

Umframt loyvisgjaldið á alivinnu rinda fyritøkur í alivinnuni eisini vanligan partafelagsskatt og kapitalvinningsskatt á sama hátt, sum aðrar fyritøkur. Eigarar av alifyritøkum rinda skatt av vinningsbýti, tá ið fyritøkurnar rinda út vinningsbýti til eigararnar.

Alifyritøkur kunnu draga loyvisgjaldið frá skattskyldugu inntøkuni á sama hátt, sum tær kunnu draga frá aðrar rakstrarútreiðslur, sum hava beinleiðis samband við virksemið hjá fyritøkuni. Rakstarútreiðslur eru sambært § 31 í skattalógini “..útreiðslur, sum í árinum ganga til at vinna inntøkur, tryggja tær og halda teimum við...”

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Uppskotið hevur til endamáls at tillaga lógina um loyvisgjald, soleiðis at alifyritøkurnar skulu gjalda lutfalsliga meira, tá laksaprísurin er høgur. Meginreglan er framvegis, at jú hægri

alifiskaprísurin er, tess hægri er gjaldið. Eisini verður botnurin hækkaður, soleiðis at eyka gjøld nú verða áløgd, tá prísurin er yvir 40 kr. pr. kilo, har gamli botnurin var 32 kr. pr. kilo.

Nógv atlit eru, tá avgerð skal takast um, hvussu nógv alifyritøkurnar skulu rinda í tøkugjaldi.

Í frágreiðing frá landsstýrisins skattanevnd, latin landsstýrinum 1. desember 2017, varð mett, at ein vansi við verandi loyvisgjaldi er, at landið fær lutfalsliga lítlan part av inntøkunum sammett við vinningin í alivinnuni, tá ið altjóða laksaprísir eru høgir. Mælt varð til at broyta loyvisgjaldið á alivinnu soleiðis, at landið fær inn størri part av inntøkunum sammett við í dag – serliga tá ið altjóða laksaprísir eru høgir.

Skattanevndin mælti til, at loyvisgjaldið varð broytt til eitt gjald á tilfeingisrentuna. Gjaldið á tilfeingisrentuna skuldi grundast á mettu tilfeingisrentuna. Mett tilfeingisrenta er staðfesta avkastið (vinningurin), sum er eftir, tá ið framleiðslukostnaður og mettur vanligur vinningur eru drignir frá staðfesta umsetninginum. Gjaldið á mettu tilfeingisrentuna skuldi eftir uppskotinum hjá skattanevndini verða 80 prosent av mettu tilfeingisrentuni.

Hóast tilmælini frá skattanevndini í 2017 vóru greið, so verður mett, at tað ikki er skynsamt at fara so ógvusliga til verka, sum skattanevndin skjýtur upp. Skilabetri er, at skipanin verður tillagað soleiðis, at føroysku alifyritøkurnar við rímiligari vissu kunnu leggja til rættis virksemið frameftir, uttan alt ov stórar stoytir av øktum gjøldum. Tað verður altíð ein politiskur spurningur um, hvussu nógv alifyritøkurnar skulu gjalda fyri rættin at gagnnýta føroysku aliøkini, og tí eigur skipanin javnan at verða eftirmett.

Harumframt verður mett, at bæði fyri alivinnu og fyri umsitingina av skipanini er eitt nýtslugjald/royalty ein einfaldari skipan enn eitt gjald á tilfeingisrentuna, sum er ein tung skipan at umsita.

Skotið verður tí upp, at verandi skipan við tøkugjaldi heldur verður endurskoðað og tillagað.

Eftir áheitan fá TAKS verður eisini skotið upp at gera eina tekniska broyting í § 2, stk. 7.

Í § 2, stk. 7 í løgtingslógini um loyvisgjald á alivinnu er ásett, at tøkugjaldið fellur til gjaldingar í fýra gjøldum ávikavist 1. februar, 1. mai, 1. august og 1. oktober við gjaldfreist tann 20. í mánaðinum. Skotið verður upp, at fjórða árliga gjaldið skal fella til gjaldingar 1. november heldur enn 1. oktober.

Longu tá lógin varð samtykt á fyrsta sinni, var ætlanin, at gjaldingin av tøkugjaldinum skuldi gerast pr. ársfjórðing eins og við meirvirðisgjaldinum, t.e. at fjórða gjaldið skuldi falla til gjaldingar 1. november við gjaldfreist tann 20. í mánaðinum.

TAKS og alivinnan virka longu sum var lógin broytt, og tískil hevur henda tekniska broytingin hvørki fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri partarnar.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógarbroytingin ger, at alifyritøkur skulu gjalda lutfalsliga hægri tøkugjald, tá laksaprísurin er høgur, og samstundis gjalda minni, tá prísurin er lágur. Sambært nýggju ásetingunum í lógini, verða gjøldini frameftir hesi:

Er prísurin 70. kr. kilo ella hægri, er gjaldið 10%.
Er prísurin millum 55 kr. kilo og 70. kr. kilo, er gjaldið 7,5%.
Er prísurin millum 45 kr. kilo og 55. kr. kilo, er gjaldið 5,0%.
Er prísurin millum 40 kr. kilo og 45 kr. kilo, er gjaldið 2,5%.
Er prísurin lægri enn 40. kr. kilo, er gjaldið 0,5%.

Hildið verður fast í grundregluni um at krevja eitt nýtslugjald fyri framíhjárættindi at gagnnýta føroysku aliøkini. Nýtslugjald verður kravt, óansæð hvussu laksaprísurin háttar sær. Er laksaprísurin lægri enn 40 kr. kilo, er gjaldið 0,5%.

Nýggjasta metingin av framleiðslukostnaðinum er áleið 40 kr. kilo.

Endamálið við stigvísa gjaldinum í mun til altjóða marknaðarprísin er, at stigini verða ásett við støði í meting av framleiðslukostnaðinum hjá alifyritøkunum, t.e. at tá marknaðarprísurin á laksi nærkast metta framleiðslukostnaðinum, so lækkar prosentvísa gjaldið.

Mánaðarligi miðalspotprísurin í evrum fyri kruvdan laks sambært "Fish Pool Index" verður framvegis brúktur sum altjóða marknaðarprísur at rokna avgjaldsgrundarlagið undir loyvisgjaldinum. Umroknað verður framvegis til danskar krónur við at nýta sentralkursin hjá Danmarks Nationalbank.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**Talva 1: Tøkugjald fyri árini 2018-2022**

| Tøkugjald | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022M |
|---|---|---|---|---|---|
| Verandi skipan | 136.400.000 | 140.000.000 | 85.700.000 | 196.000.000 | 267.798.125 |

Í talvu 1 eitt sæst, hvussu nógv landið hevur fingið inn í tøkugjaldi árini 2018-2002 eftir verandi skipan. Í 2021 vóru prísirnir lutfalsliga lágir, men hóast hetta fekk landið 196 mió. kr. inn í tøkugjaldi. Hevði nýggja skipanin verið galdandi í 2021, hevði landið fingið umleið 60-65 mió. kr. minni inn í tøkugjaldi.

**Talva 2: Mett tøkugjøld fyri árini 2023-2024**

| Tøkugjald | 2023M | 2024M |
|---|---|---|
| Verandi skipan | 255.789.514 | 240.799.795 |
| Nýggja skipanin | 330.490.384 | 268.117.555 |
| **Munur** | 74.700.870 | 27.317.760 |

Sum sagt, so tryggjar nýggja skipanin, at alifyritøkur skulu gjalda lutfalsliga hægri tøkugjald, tá laksaprísurin er høgur, og samstundis gjalda minni, tá prísurin er lágur. Í talvu 2 sæst, hvussu nógv landið væntar í meirinntøku av nýggju skipanini árini 2023 og 2024.

*Avleiðing fyri tøkugjaldið*
Eftir verandi skipan hevði landið fingið 255,8 mió. kr. í tøkugjaldi í 2023. Eftir nýggju skipanini fær landið 330,5 mió. kr. í tøkugjaldi í 2023. Metingin er sostatt, at landskassin fær 74,7 mió. kr. í øktari inntøku, sum avleiðing av lógaruppskotinum.

*Avleiðing fyri partafelagsskattin*
Tøkugjaldið er at meta sum ein rakstrarkostnaður hjá alifyritøkunum, og skal tí dragast frá í skattskyldugu inntøkuni sambært skattalógini. Økta tøkugjaldið ger, at úrslitini hjá alifyritøkunum minka og harvið rinda hesi minni í partafelagsskatti. Partafelagsskatturin er í løtuni 18%.

Kommunurnar fáa 30% av partafelagsskattinum og landið fær 70%, so hetta ávirkar eisini kommunurnar. Taka vit t.d. árið 2023, har metta meirinntøkan, sum avleiðing av nýggju skipanini, er 74,4 mió. kr., so minkar partafelagsskatturin við umleið 13,5 mió. kr. Netto eru sostatt umleið 61 mió. kr. eftir til almennu kassarnar. Partafelagsskatturin verður tó inngoldin árið eftir at ársúrslitið fyriliggur, í hesum førinum í 2024.

*Avleiðing fyri skatt á vinningsbýti*
Eitt økt tøkugjald merkir alt annað líka, at minni verður at luta út til partaeigararnar, og tí minkar skatturin á vinningsbýti eisini. Í miðal fær landið 7,4% av rakstrarúrslitinum inn í vinningsbýtisskatti. Hetta merkir, at um vit økja rakstrarkostnaðin hjá alivinnuni við einum øktum tøkugjaldi, so missa vit 7,4% av hesi øktu inntøkuni sum ein lækkaðan vinningsbýtisskatt. Hetta svarar til áleið 5,4 mió. kr.

*Samlaða avleiðingin fyri almennu kassarnar*
Um vit rokna við at fáa 74,4 mió. kr. eyka í tøkugjaldi næsta ár, so missa vit 13,5 mió. kr. í partafelagsskatti og 5,4 mió. kr. í vinningsbýtisskatti. Økta nettoinntøkan til almennu kassarnar verður sostatt 55,7 mió. kr.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Føroysku alifyritøkurnar verða ávirkaðar av uppskotinum. Fyri alivinnuna hevur uppskotið við sær, at tøkugjaldið í 2023 væntandi økist við umleið 74,7 mió. kr. Hetta merkir, at rakstrarkostnaðurin hjá føroysku alifyritøkunum hækkar 74,7 mió. kr. Økti rakstrarkostnaðurin merkir, at alifyritøkurnar, alt annað líka, rinda lutfalsliga minni í partafelagsskatti og rinda lutfalsliga minni út í vinningsbýti.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Uppskotið sampakkar við millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið samsvarar við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum eru viðkomandi fyri uppskotið.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið elvir ikki til markaforðinar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, panting og sektir og ger ikki onnur størri inntriv í rættindini hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Tað eru ikki ásetingar um skattir og avgjøld í uppskotinum, sbr. pkt. 2.12 niðanfyri.

**2.12. Gjøld**
Loyvisgjaldið á alivinnuna er ikki at meta sum ein skattur, men heldur sum eitt nýtslugjald, sum landsmyndugleikarnir áleggja fyri rættin at gagnnýta føroysku aliøkini.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan landsstýrismann ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Avgjaldsgrundarlagið verður framvegis roknað sum tann nøgdin, alifelagið hevur slaktað í kruvdari vekt, faldað við miðal altjóða marknaðarprísinum sama mánað. Hetta er eins og í galdandi lóg. Mánaðarligi miðalspotprísurin í evrum fyri kruvdan laks sambært Fish Pool Index verður framvegis brúktur sum altjóða marknaðarprísur at rokna avgjaldsgrundarlagið undir loyvisgjaldinum. Hetta er sama skipan, sum eftir galdandi lóg.

Uppskotið broytir lógina soleiðis, at alifyritøkurnar skulu gjalda lutfalsliga meira, tá laksaprísirnir eru høgir.

*Gamla skipanin – galdandi lóg*
Er prísurin 36 kr. kilo ella hægri, er gjaldið 5%.
Er prísurin millum 32 kr. og 36 kr. kilo, er gjaldið 2,5%.
Er prísurin lægri enn 32 kr. kilo, er gjaldið 0,5%.

*Nýggja skipanin - lógaruppskotið*
Er prísurin 70 kr. kilo ella hægri, er gjaldið 10%.
Er prísurin millum 55 kr. og 70 kr. kilo, er gjaldið 7,5%.
Er prísurin millum 45 kr. og 55 kr. kilo, er gjaldið 5,0%.
Er prísurin millum 40 kr. og 45 kr. kilo, er gjaldið 2,5%.
Er prísurin lægri enn 40 kr. kilo, er gjaldið 0,5%.

Í § 2, stk. 7 í løgtingslógini um loyvisgjald á alivinnu er ásett, at tøkugjaldið fellur til gjaldingar í 4 gjøldum ávikavist 1. februar, 1. mai, 1. august og 1. oktober við gjaldfreist tann 20. í mánaðinum. Lógarbroytingin ger, at fjórða árliga gjaldið skal fella til gjaldingar 1. november heldur enn 1. oktober.

Longu tá lógin varð samtykt á fyrsta sinni, var ætlanin, at gjaldingin av tøkugjaldinum skuldi gerast pr. ársfjórðing eins og við meirvirðisgjaldinum, t.e. at fjórða gjaldið skuldi fella til gjaldingar 1. november við gjaldfreist tann 20. í mánaðinum.

**Til § 2**
Eftir uppskotinum skal lógin fáa gildi 1. januar 2023.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, dagfesting.

**Magnus Rasmussen**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1:
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: